gult cyan magenta svart

Police - superbólkurin sum upploystist av superklandri

Sí›st í 70’unum kom enski bólkurin The Police drønandi á heimspallin vi› lagnum ‘Roxanne’. Lesi her um bólkin, sum var tann fyrsti at blanda reggae og punk saman og skrivaxi seg so dyggiliga 8 rocks0guna sum ein av teimum heilt st9ru

NICLAS JOHANNESEN

Sig Nirvana, Phish, Offspring, No Doubt, Pearl Jam. Og tú hugsar um 90’ini. Sjálvir vilja allir hesir bólkar peika aftur til seinast í 70’unum fyrst í 80’unum og siga: The Police.

Enski trio-bólkurin, sum leg›i n‡ggjar lunnar undir, hvussu rockur kann ljó›a. Ein dygg blanding millum hvítan up-beat punk og svart back-beat reggae føddist vi› enska bólkinum, sum upploystist sama kvøld sum teir tríggir Sting, Andy Summers og Stewart Copeland endurtóku 60’ara bragdi hjá The Beatles og spældu fyri 70.000 garvillum áhoyrarum á Shea Stadium í New York. Men á›renn hetta var heimurin vor›in ein politistatur av egnum fríum vilja. Teir tríggir løgreglumenninir høvdu ikki meira at vinna. Og hetta kvøldi› - eftir fimm ár í oddinum - valdi Sting at takka fyri seg og bróta burtur úr n‡ggjum.
Júst sum sjey ár framman undan.

Skúlalærari

Vit spola aftur til veturin 1976. London. Ein skúlalærari kemur til b‡in. Gordon Sumner, sonur ein mjólkamann í Newcastle, hevur gjørt upp vi› seg sjálvan. 26 ára gamalur, n‡giftur og júst vor›in pápi vil hann royna, hvussu langt hansara veingir kunnu bera.

Gordon er heldur ikki bara Gordon. Hann hevur fingi› sær listarnavni› Sting. Í London hittir Sting amerikanska trummuspælaran Stewart Copeland. Teir spæla saman sum trio vi› ymsum guitarleikarum, men ta› er ikki fyrr enn tann naka› eldri (hann var 35 ára gamal tá) Gordon Summer kemur upp í, at Police byrjar at líkjast sær sjálvum.

Aftrat sær hava Police eisini bró›ir Stewart Copeland, Miles Copeland, i› virkar sum managari fyri bólkin. Fyrstu fátæksligu tí›ina skumpar hann bólkin fram og fær loksins gjørt ein plátusáttmála vi› A&M Records. Hesin sáttmálin skal sí›ani gerast gull verdur, tí Miles Copeland heldur enn at tryggja Police stórt forskot, tryggja›i bólkinum stóran prosentpart av møguligari sølu.

Í 1978 fer bólkurin til USA at spæla í New York og har í nánd. Teir koma heim aftur fegnir men fátækir. Sama ári› fer bólkurin í studio at innspæla teirra fyrstu plátu. Hetta er júst me›an punk bylgjan er upp á ta› hægsta og núverandi bólkar so sum Offspring hava eitt nú nevnt “Can’t Stand Losing You” sum eitt t‡›andi punklag fyri tí›arskei›i› sí›st í 70’unum.

Um punkbylgjuna og leiklutin hjá Police hevur Sting havt á or›i:

- Sannleikin er, at okkum dámdi orkuna, punk tónleikurin hev›i, men sjálvir kundu vit ikki rættiliga vera partur av hesi rørslu. Ein av okkara trupulleikum var, at vit vóru rættiliga stinnir á okkara ljó›føri - hetta var avgjørt ein for›ing!

Reggae-bland

Ta›, sum veruliga sermerkti The Police var, at bólkurin blanda›i reggae tónleikin upp í væl kenda punk-rockin. Tónleikurin var haraftrat bygdur á eitt serliga sterkt fundament: kompositiónirnar hjá Sting.

Hetta hoyrdist aftur longu á fyrstu plátuni Outlandos d’Amour, sum kom út í 1978. Rái, ópolera›i guitar-trio-rockurin kom og avloysti eina syndafló› av progressivum 70’ara rockbólkum so sum Yes, Jefferson Airplane og Genesis osfr_Lurtarin fekk fríska luft.

Um reaggy íblásturin hevur Sting sagt:
“Ta› hevur aldrin sagt okkum naka›, at fólk spæla tríggjar akkordir um aftur og umaftur. Reggae var gó›kent í punk-umhvørvinum og musikalskt eitt sindur meira sofistikera›, so vit fóru eitt sindur tann vegin.”
Sting vi›gekk sí›ani ví›ari, at teirra “fyrsta” reggae lag - ‘So Lonely’ - var snøgt sagt tiki› frá Bob Marley og hansara lagi ‘No Woman No Cry’. Serliga ni›urløgini eru meinlík.

- Ta›, sum vit sjálvir funnu upp á var hetta at skifta millum thrash-punk og reggae. Hetta var ta› lítla sermerki›, vit skaptu fyri okkum sjálvar.
Mótpolarnir í bólkinum vóru teir bá›ir Sting og Stewart Copeland. Teir vóru ofta sum tvær rey›ar k‡r, at kalla altí› ósamdir um, hvussu teirra tónleikur skuldi spælast. Seigar søgur vilja vera vi›, at ta› ofta var beinlei›is áfast millum teirra. Copeland var ein ordiligur rockari, villur og ikki bangin fyri at siga sína hugsan - fullkomiliga óinnballa›. Sting var hinvegin fámæltari, men kortini serstakliga bevístur um, hvør hann var og hvat hann vildi vi› síni karrieru. Tónlistarliga vildi Copeland altí› skrúva tempoi› upp og vera so radikalur sum gjørligt, me›an Sting í útgangspunktinum ofta ynskti at hava eitt tyngri stev (hetta hoyrist aftur í tónleikinum Sting hevur framleitt eftir at Police fór í søguna) og helt ofta, at hugskotini hjá Copeland vóru “over the top”. Í hesum førinum góvu ymisku hugsunarhættirnir bólkinum ein dynamikk, i› skjótt skuldi vísa seg at vera væl móttikin kring allan heim.



Enski trio-bólkurin, sum leg›i n‡ggjar lunnar undir, hvussu rockur kann ljó›a

Pengar fossa inn

At byrja vi› skriva›u allir løgini saman. Men hetta skuldi skjótt broytast.

20. Oktober 1977 gekk Sting oman eftir rey›l‡sandi sk‡maskotsgøtunum í París og skriva›i tekstin til ‘Roxanne’. Hetta var fyrsta stóra hit-lagi› hjá bólkinum, og eftir hetta hendi eitt makt-skifti í bólkinum. Sting, sum at byrja› vit mátti berjast fyri síni søk, tí bæ›i Stewart Copeland og Andy Summers høvdu dyggari royndir enn hann, dróg vi› hesum lagnum frá teimum. Og nú fór eisini at ganga slag í slag hjá bólkinum.

Tí›arskei›i› apríl 1979 til februar 1980 endurútgevur plátufelagi› A&M f‡ra á›ur kiksa› single-løg, sum hesar fer› øll koma ovast á tónatindarnar. Millum hit-løgini hetta ári› telist ‘Message In A Bottle’. Hetta tí›arskei›i› selja The Police fimm milliónir single-plátur og fimm millriónir lp-plátur. Takka› veri› á›urnevnda gó›a plátusáttmálanum, sum Miles Copeland tryggja›i bólkinum, byrja›u pengarnir at fossa inn.

Og nú komu hit-pláturnar bara slag í slag. Í 1980 kom Zenyatta Mondatta vi› hitløgum so sum ‘Don’t Stand So Close To Me’ og ‘Do Do Do, Da Da Da’. Í 1981 ver›ur Ghost In The Machine útgivin vi› løgum so sum ‘Every Little Thing She Does Is Magic’, i› eisini gjørdist størsta hit-lagi› á Ghost-plátuni. Útgávan vísti eisini eitt ávíst stílskifti. Nú vóru brádliga synthezisarar, blásarar og onnur keyboard at hoyra - ikki minst klaverspæli› á ‘Every Little Thing She Does Is Magic’ bar bo› um eitt ávíst stílbrot. Me›an Sting dámdi væl hesa broyting, so vóru hinir bá›ir Copeland og Summer onki vi› upp á klaverspæli›.
Stewart Copeland:

“Vit royndu at gera sangin til ein Police sang - sum í veruleikanum merkti at gera arrangementi› hjá Sting umaftur. Ta› var okkara politikkur undir øllum umstø›um. Solei›is hev›i ta› altí› veri›. Blaka arrangementini hjá Sting út og sí›ani var›veita melodi og or›.”

Men ‘Every Little Thing She Does’ vildi ta› ø›rvísi:

Stewart Copeland heldur fram:

“Vit royndu at spæla í einum lægri tempo enn á demoini hjá Sting, vit royndu eina púra svaka punk-versjón. Andy og eg royndu at venda akkordunum á høvdi›. We brúktu meira tí› upp á hendan sangin enn allar hinar sangirnar tilsamans. Ein morgun, tá h‡rurin var út av lagi vánaligur, minnist eg, at eg seg›i ‘okay, koyr upprunaligu demoina hjá Sting á, so skal eg vísa tykkum, hvussu ússalig hon er’. So Sting stó› framman fyri meg og vinka›i meg gjøgnum lagi›. Eg gjørdi bert eina roynd og hendan enda›i tá avtorna›i á útgávuni. Og sí›ani gjørdi Andy ta› sama vi› guitarinum. Vit valdu at standa andlit til andlits vi› tónleikin, bitu allan stoltleika í okkum og brúktu versjónina hjá Sting og hansara demo. Lort.”

Um hetta mundi› skriva›i Sting eisini lagi› ‘Invisible Sun’, i› snú›i seg um trupulleikarnar í Nor›urírlandi. Lagi› bleiv alt fyri eitt banna› at spæla í BBC. Og hetta var bara vi› til at geva bólkinum upp aftur meira umtalu.

Klandur og strí›

Men lagi› var ringt á politistø›ini. Í 1980 var illviljin millum Sting og Stewart Copeland vor›in legendariskur. Sting hev›i høgar ambitiónir vi› sínari egnu tónlistarlei›, og hinir bá›ir Copeland og Summer kendu á sær, at Sting bert vildi brúka The Police sum lopfjøl.

Ofta vóru ta› tey minstu tingini, sum kundu fáa alt upp at skúma. Í einum umklæ›ingarhøli í Amerika - undan eini konsert - gjørdi Sting sínar vanligu armboyggingar, búk-venjingar og strekkingar, tá Stewart Copeland kom framvi› og blaka›i ein trummupinn í høvdi› á Sting. Og so var aftur áfast millum teirra. Á Wembley, undan eini konsert, seg›i Sting ísakaldur vi› Copeland: “Um tú títtar meira, so endar tú vit at flúgva upp gjøgnum tína egnu reyv”. Tónin var eirindaleysur. Og nú tykstist ta› bara sum ein spurningur um tí›, á›renn ta› var leyst og li›ugt millum teir tríggjar í Police.

Ta› var undir serstakliga súrum umstø›um, at Police innspældu Synchronicity, i› skuldi vísa seg at gerast sí›sta útgávan hjá The Police. Ári› er 1983 og teir tríggir eru staddir í Monsterrat - í studionum hjá George Martin - har eisini undanfarna plátan Ghost In The Machine var upptikin.

Vi› Synchronicity rukku The Police bæ›i toppin og botnin. Teirra størsta hit-lag nakrantí› ‘Every Breath You Take’ var vi› á hesi plátuni, samstundis sum klima›i í studionum var alíkt tí a Svalbard. Har var ískalt.

Stewart Copeland minnist, hvussu hann sat isolera›ur uppi á einum lofti og bert kundi síggja á einum skíggja hinar bá›ar Sting og Summer. “Øll plátan var upptikin í ótrúligari ringari atmosferu”, seg›i Copeland.

Á vári 1983 kemur Synchronicity út og røkkur ovastu tindar bæ›i í USA og Bretlandi. Nakrar mána›ir seinni spæla Police a Shea Stadium. 70.000 áhoyrarar eru í at kalla í ekstasu. The Police mugu av røttum metast at vera ein super-bólkur. Copeland og Summer minnast hetta kvøldi› framman fyri stóru mannfjøldini, sum ein av størstu upplivingunum í teirra lívi.

Hetta sama kvøldi› avger Sting at fara úr The Police.

Keldur: Sting - Demolition Man, Revolver magasin, internet

gult cyan magenta svart

Í býin
- altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin

Hóskvøldið LIVE-KVØLD við TAXI

Fríggja- og leygarkvøldið spælir TAXI

Sunnukvøldið UNPLUGGED á miðhæddini við TAXI

Kaggin Kaggin Kaggin

www.kaggin.fo

GEVIÐ BLÓÐ

fk Mat-seðilin

Hósdagin 13. juli:
Bankikjøt

Fríggjadagin 14. juli:
Entrecote

Leygardagin 15. juli:
Fleskasteik

Mánadagin 17. juli:
Gjørd hara

Týsdagin 18. juli:
Bollar í karry

Mikudagin 19. juli:
Saltkjøt

Kostnaður 30,- kr.

***

Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella
Búffsandwich 19,95

Matstovan í Hoyvík

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen

Á Vestanstevnu verður koyrt soleiðis:

Fríggjakvøldið 14/7:
• Úr Vestmanna kl. 23
• Úr Tórshavn kl. 24
• Úr Vestmanna kl. 05
• Úr Tórshavn kl. 06

Leygarkvøldið 15/7:
• Úr Vestmanna kl. 23
• Úr Tórshavn kl. 24
• Úr Vestmanna kl. 05
• Úr Tórshavn kl. 06

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð)

Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu

Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra
- so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALTDØGNIÐ -
AUTO
311234

Lesið Sosialin Sosialin Sosialin -tað loysir seg

sosialurin
Altíð fyrst við
www.sosialurin.fo

Vilja tygum við í í býin - hvønn hósdag

Ynskja tygum at l‡sa í teiginum *í b‡in*, so fylli› út henda lepan og sendi› hann til **Sosialin, box 76, 110 Tórshavn** – ella fax 314720

Tekstur

Su›uroy

Eyðun Nolsøe & Terji Rasmussen
spæla til dans
í VB-húsinum
LEYGARKVØLDIÐ
15. JULI
frá kl. 23.00 til kl. 04.00

Sosialurin - 311820

Bussar koyra í sambandi við tiltakið
1905 VB Vágs Bóltfelag

Nor›oyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Dansur verður leygarkvøldið 15. juli.
Martin vendir plátum!
Klubbin hevur:
POOLBORÐ
BILLARDBORÐ
ENSKAN FÓTBÓLT
Á SKY

STØÐUGT FLEIRI HALDA Sosialin
WWW.SOSIALURIN.FO

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 360,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 510,-/ársfj.
☐ 5 bløð einaferð um vikuna í Europa: 425,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.